## DAGSINS MEINING

# Gleði og strongd í jólamánaðinum

Jólamánaðurin er tann tíðin á árinum, tá full ferð er á øllum samfelagshjólunum. Jólagávukeyp, jólafrokostar osfr. Ein gleðistíð tó eisini ein strongdartíð, tí alt skal røkkast, áðrenn vit loksins seta okkum við jólaborðið.

Nettupp tað nógva hóvastákið saman við jólastrongd er oftani orsøk til óhapp og vanlukkur av ymsum slag. Hvussu oftani hoyra vit ikki fólk siga eftir eitt av hesum afturvendandi óhappum: hví skal tað altíð henda í jólamánaðinum, tá annars øll gleða seg saman við børnunum til jóla! Hyggja vit aftur um bak, so hevur tað víst seg, at fólk koma oftani til skaða ella doyggja í ferðluóhappum í hesum mánaðinum, hús brekka í grund osfr. Áhugavert kundi verið við eini skráseting, sum vísir, hvat tað eru fyri óhapp, sum henda í jólamánaðinum, hví tey henda og hvørjar avleiðingar tey hava. Hetta fyri at kunna vera meira medvitandi um, hvussu vit fyribyrgja ella minka um hesi mongu óhapp, sum helst standast av jólastákan og jólastrongd.

Hetta er so eisini seinasti mánaðurin á árinum, so nógv er, sum skal røkkast innan árslok. Hetta er eisini tann myrki mánaðurin, sum oftani skapar trupulleikar í ferðsluni. Nettupp ferðslan er stóri syndarin í hesum mánaðinum og skyldast hetta uttan iva ta strongd, sum hevur bygt seg upp til endan á árinum. Henda sannroynd eigur at fáa øll, sum koyra og tey, sum eru til gongu, at umhugsa seg enn betur enn vanligt. Tú kundi sagt sum ein felagsnevnara, at øll áttu at sett ferðina niður í bygdum øki til 30 kilometrar um tímar og úti á alfaravegi niður til 50 til 70 km. Men vansin er so tann, at nettupp í hesum mánaðinum skulu vit røkka so nógv, hvør Per og Pól skal til jólafrokost og jólagávur verða keyptar í síðstu løtu, so full ferð er á. Tað skal vera áheitan okkara, at fólk traðka spakuligari á speedaran allan jólamánaðin og vísa størsta varsemi við eldi heima við hús. Størri árvakni á hesum økjum kann vera við til at gera jólini til eina gleðishátíð heldur enn eina sorgarstund fyri flestu av okkum.

# Eykajáttanarlógir uppá kvamsvís

Í gjár fór tingið undir at viðgera álitini til fíggjarlóg frá Fíggjarnevndini. Umboðið hjá Javnaðarflokkinum í Fíggjarnevndini, Vilhelm Johannesen var ein fyrstu røðarunum og fanst hann harðliga at landsstýrinum/samgonguni fyri at sítt fíggjarlógararbeiði. Hann helt tað vera skeivt at byggja komandi fíggjarár uppá eykajáttanarlógir, nú sjálv fíggjarlógin er so ófullkomin og at meta sum eina klædda. Hetta fær helst fólk at minnast aftur á orðini hjá fíggjarnevndarformanninum Óla Breckmann, sum herfyri segði, at nú kundi tað vera nokk við at leggja eykajáttanarlógir fyri tingið. Við hesum vildi hann seta ein stoppara fyri tí nýggjan framgangsmátanum hjá Karsten Hansen at leggja eina eykajáttanarlóg fyri tingið og aðra eftir. Nú hevur so sami Breckmann givið fullkomiliga leyst og grønt ljós fyri, at hesin eykajáttanarpolitikkurin sleppur at halda fram. Hvar er trúvirðið hjá fíggjarnevndarformanninum, nú sett er út í kortið, at eykajáttanarlógir framhaldandi skulu vera høvuðsreglan heldur enn undantakið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vestmanna – hvat nú!!!

**Bárður Nielsen**
*Løgtingsmaður*



Vestmenningar hava nú í nakrar dagar følt tómrúmið eftir, at rutan um Vestmannasund er niðurløgd, tí undirsjóvartunnilin er tikin í nýtslu. Rutan um Vestmannasund hevur nú í fleiri mansaldrar verið ein bygdarmynd, ið hevur sermerkt Vestmanna, rutan hevur verið við til at skapt lív í á fjørðinum, og um man saknaði eitt sindur av lívi, so var bara at hyggja á ferjuleguna, tí har var altíð eitt ella annað virksemi. Rutan hevur verið við til, at sett Vestmanna á føroyakortið og gjørt, at hvørt mansbarn kennir eitt sindur til Vestmanna, tí tey onkuntíð eru farin av landinum við flogfari ella hava verið í Vestmanna eftir onkrum kenningum.

Vit koma at merkja hetta uppá ymsar mátar, eittnú verður bussambandið ikki eins gott og áður, vinnulívið fær ikki eins góðar flutningsmøguleikar, við tað at Farmaleiðir og tær privatu flutningsfyritøkurnar koma ikki eins ofta sum áður til bygdina, og ein partur av handilslívinum í bygdini fer at merkja eina niðurgongd í søluni, serliga Shellstøðin og Rutucaféin.

Nú henda rutan ikki er meira, eru vit noydd til at gera vart við okkum uppá aðrar mátar, tí tað er ikki vist, at komandi ættarlið fara at koma til Vestmannar, tí nú eru vit ein endastøð, og um vit ikki hava okkurt serligt at vísa á, kann ikki roknast við, at tað koma serliga nógv avbygdafólk til Vestmanna, men vónandi verður ítróttturin eisini í framtíðini við í fremstu røð, og soleiðis við til at gera vart við, at vit framvegis eru ein livandi bygd.

Tað er ongantíð meir neyðugt enn júst nú, at vit vestmenningur bróta upp um armar og royna at skapa meir virksemi í bygdini. Vit hava gjøgnum tíðina víst, at vit klára at tillaga okkum nýggjar tíðir, og hóast seigligir av lyndi, ofta eru við til at bróta upp úr nýggjum og verða við í fremstu røð innan vinnuna.

Tann eftir hondini nógv umtalaði fiskivinnudepilin er kærkomin, og vil hann heilt vist verða við til at seta lív í bygdina og fylla aftur tað tómrúmið, ið vil verða eftir at farleiðin vestur á flogvøllin ikki longur gongur gjøgnum Vestmanna. Nú rutan er niðurløgd, verður eitt stórt øki Inni á Fjørð tøkt, so møguleikarnir har eru nógvir, og vónandi fer vinnulívið at gera sær dælt av hesum innan alt ov lang tíð er fráliðin.

# Kunning um tilkalling og venjing í Vágatunlinum

**Brunaumsjón landsins**
*Petur Olsen, deildarstjóri*



Sunnukvøldið 8/12 var ein venjing, sum brunaumsjónin hevði lagt til rættis. Eftirmetingin visti at siga, at m.a. sløkkiinnsatsurin gekk "ópáklæðiliga" ella rímiliga væl. Men nakað av venjingini misti eitt sindur av tí "veruleikanum", sum ætlandi skuldi verða í henni. Vit fingu ikki rættiliga alt tað fram, sum vit ætlaðu.

Orsøkin var, at alarmsentralurin ikki fekk boðini út til allar sløkkiliðsmanningarnar.

Tað hevur síðani verið nevnt, at sløkkiliðsmanningarnar mugu kanna sínar telefonir við at ringja til telefonverkið, og so hevur eisini verið nevnt, at bert Tórshavnar- og Klaksvíkar kommunur uppfylla § 12 í brunalógini um útkalling.

Her kann viðmerkjast, at um tosað verður um ta serligu (pippara) útkalliskipanina, sum sløkkiliðini í Tórshavn og Klaksvík hava, og um skyldurnar í § 12 fyri restina av landinum undir einum, so stendst hetta møguliga av eini misskiljing ella má okkurt onkursvegna vera komið skeivt fyri.

Vit hava frá sløkkiliðsleiðarum fingið nakrar spurningar um hetta.

Av tí at hetta við tilkalling og kommunuskyldu hevur stóran almennan og prinsippiellan týdning, skal verða sagt frá, at kommunurnar kring landið, við verandi skipan uppfylla ásetingarnar í § 12 í brunalógini.

Í stuttum sigur § 12 hetta (eitt brot endurgivið á donskum).

*"For hver kommuna skal der findes en plan for alarmering af brandvæsnnet.*

Fyri at koma aftur til sjálva útkallingina er tað soleiðis, at "kiksini" við útkallingini á alarmsentralinum, sum man hoyrir um av og á, mugu ikki leggjast, hvørki kommununum ella tí vanliga sløkkiliðsmanninum til last.

Tí í so máta eru hesi bert vanligir telefonfelagaðar.

Nevnast kann annars, at tað eru tilsamans um.l. 500 sløkkiliðsfólk á teimum ymsu tilkallingarlistunum og har eru okkurt um 1100 telefonnummur. Hetta umsitur og dagførir Brunaumsjón landsins saman við brunaumsjónarmonnunum kring landið.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Hví einki veruligt?

**Rólant Christensen**

Seinastu ttíðina hevur nógv verið frammi í bløðnum, mest í Sosialinum, um viðurskiftini í Tórshavnar Kommunu, eftir at Kollafjørður legði saman við Havnina.

Nógvir kollfirðingar eru misnøgdir við viðferðina, teir fáa frá Tórshavnar Kommunu.

Í Sosialinum fyrr í vikuni roynir Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, at verja sína støðu og býráðið í Havn

Tað sæst í viðtalinum við borgarstjóran, at hann ikki virðir teir borgarar, sum gjørdu tað, at hann situr á tí posti, hann situr á í dag.

Men tað mistakið vænti eg ikki, at kollfirðingar fara at gera aftur

Hann hevur aftaná gramt seg um, at tað stóð í yvirskriftini, at tað var hol í høvdið at tey eru misnøgd í Kollafirði, men ananrs heldur hann, at greinin er sera góð.

Eg haldi sjálvur, at greinin er sera væl skrivað, og tað sæst, hví skrivarin hevur valt at nýta hasa yvirskriftina.

Jan Christiansen ger í geinini vart við, at nakrar av avgerðunum, ið gamla bygdaráðið tók vórðu (og tað vóru avgerðir, ið bygdarfólkið vildu hava), ikki vóru so hepnar fyri Tórshavnar- ætlanini, sum td. byggiloyvini á økinum innast á fjørðinum, har har einki skip grynnir. Loyvini skuldu ikki verða givin til vinnubygningar, tí at økið skuldi nýtast til tað ið hevur við sjógvin at gera, sigur Jan Christiansen.

Eg eri sanførdur um at hvørki virki um tey flóta á sjónum ella liggja við kei, kunnu vera ravmagn fyri uttan, so sjálvandi eigur eitt virki sum ID-EL at vera á havnaøkinum við góðum umstøðum.

Tað prima ið býráðið nýtur er íløguloftið. Men betur hevði verði, um tær umleið 10 milliónirna ið nýttar eru til nýggjar bilar og maskinir at taka arbeiðið frá tí privata fyri undirprís, heldur vórðu brúktar til at bygt skúlan út fyri.

Tað treingir harðliga til, tí eg veit ongan skúla í Havn, har tað er upp í 30 børn í somu skúlastovu dag út og dag inn, so hvar tørvurin er størst er ikki ringt at meta um.

Jan nevnir síðani alt, sum er gjørt er í Kollafirði síðani samanleggingina.

Eg kann fortelja honum, at enn er einki gjørt í Kollafjørði, sum Tórshavnar Havn og Tórshavnar kommunukassi ikki fá stóran vinning burtur úr, og enn er einki gjørt, sum tann meinigi kollfirrðingurin kann njóta ella fá nakra nyttu burturúr.

Hann sigur eisini, at Klosterboer ikki var komið, um Tórshavn ikki varð við.

Eg havi latið mær fortalt, at Johan Klosterboer hevði gjørt avtaluna við bygdaráðið og hevði bjóðað sær til at gera keiina, skuldi tað gjørst neyðugt. Eg havi eisini latið mær fortalt, at J. Klosterboer keypti øll spunslini til havnagerðina fyri at vera vísur í at havnalagið kom.

Hasar 40 milliónirnar, sum borgarstjórin tosar um, eru brúktar uppá havnina, hava teir fingið inn í skatti og nakað val afturrat úr Kollafjørði, umframt havnagjald fyri øll skipini, ið hava ligið við bryggju. Sostatt verður spurningurin um, hvør skal gjalda hvørjum, um tað vildi so væl við, at kollfirðingar gjørdu av, at sleppa sær av við Tórshavnar Kommunu aftur og fingu sær sítt egna stýri aftur.

Ein kann ímynda sær, hvat Tórshavnar Kommuna ætlar at havnalagið, og kanska allur dalurin, skal nýtast til.

Tað er komið mær fyri oyrað, at havnarmenn ætla at taka oljuvinnuna til Havnar, men bert umsitingina. Og hvar skal so allur útbúnaðurin, ið har til hoyrir, so goymast, eitt nú ovurstórar stálmeistrar og fleiri hundrað kilometrar av oljudálkandi rørum, ið krevja túsundatals av fermetrum? Jú í Kollafjørði er mær fortalt. Ræðandi!

Eg vænti at bóndin á Oyrarareingjum má innflyta grasið hjá sær úr Dannmørkini, um oljuvinna verður í Føroyum og fara á fjall á tekjunum á vinnubygningunum.

Tann borgarligi borgarstjórin kemur ikki við einum einsta borgarligum lyfti um at gera nakað við, at kollfirðingar nú hava Tórshavnar Kommunu sum kappingarneyta, hann lovar ongar privatiseringar, ikki skattalættan, einki. Nei, hann krevur bara meiri. Hann krevur at Kollfirðingar, ið hava sáttmála upp á Rás Tórshavn, nú skulu gjalda túsundtals krónur til Televarpið. Tað er brot á sáttmálan um samanleggingina.

Borgarstjórin í Havn kann ikki verða borgarligur. Heldur mann hann vera droyðreyður USSR maður, og kanska er Fólkaflokkurin sum heild farin meira tann vegin, annars høvdu teir gjørt okkurt við býðráðslimirnar í Havn.

Eg meti, at har ið gravskitið er, er mann noyddur at nýta tvøgu, og vil man ikki verða tvøgan, skal mann lata vera við, at biða um at verða valdur inn í politikk.

Eitt meti eg, og tað er, at tað síðsta, ein fólkafloksmaður eigur at gera, er at nýta "Nyrup-háttin", at ræða við peningi, tí tá hevur mann sett seg lágt.

Tað er ein fólkarættur at kunna geva sýnum børnum skúlapláss og trivnað, so løgi hevði verið um kollfirðingar ikki høvdu fingið loyvi bygt skúlan og høllina, tí kollfirðingar hava altíð klárað sítt.

At enda fari eg at heita á gamla bygdarráðið um at fara til fundar og finna útav, um ikki fólkið í Kollafirði átti at verðið eftirspurt eina ferð afturat.

Og hesaferð skulu teir verða spurdir, antin teir vilja verða kollfirðingar ella havnarmenn og ikki sum seinast, um teir vilja vera vestminningar ella havnarmenn.

# Bóklingur um nýggja brúkaraprístalið

TÍÐINDASKRIV
*Hagstova Føroya*

Veitst tú, hvussu nógv av tí, vit í Føroyum vanliga brúka, fer til til mjólk og sodavatn, til kjøt og breyð, til telefon, teldur og internet, til bil og buss, til uttanlandsferðir, til klæðir, til frítíðarítriv, til el og olju osv. ? Tað kanst tú fáa at vita í bóklinginum, sum Hagstova Føroya nú hevur givið út um nýggja brúkaraprístalið hjá okkum.

Men hvat er eitt brúkaraprístal? Hvussu ger man tað? Hvørjar vørur og tænastur, hvørjir prísir skulu við? Hvussu roknar man tað. Og hvat vóru úrslitini av kanningunum, sum Hagstovan gjørdi, fyri at finna grundarlagið undir nýggja prístalinum? Hetta eru evnini í nýggja bóklinginum hjá Hagstovuni.

Vit fingu nýtt brúkaraprístal í fjør. Hetta varð neyðugt, tí gamla brúkaraprístalið frá 1975, ið bygdi á kanningar av húsarhaldsnýtsluni í 1972, var ikki eftirfarandi longur. Tað gav at bíta við sáttmálasamráðingarnar í 1999, tá ið ósemja um veruliga prísvøksturin í Føroyum tók seg upp millum partarnar, og tað gjørdist alment kunnugt, at neyðugt var við nýggjum, álítandi prístalið.

Tá vit samanbera mynstrið í húsarhaldsnýtsluni í 1975 og 2001, sæst týðiliga, at stórar broytingar eru hendar. Húsarhaldini brúka nú meir av summum og minni av øðrum. Fleiri av vørunum og tænastunum, húsarhaldini nýttu í 1972, eru nú mest sum horvnar. Og nógvar aðrar, nýggjar vørur og tænastur eru komnar aftrat. Eisini var í 1972 nógv størsti parturin av nýtsluni beinleiðis vørukeyp - nú er nógv størri partur keyp og nýtsla av tænastum.

Hetta yvirlitið vísir týðuliga broytingina í nýtslumynstrinum frá 1975 til 2001:

1. juli 2001 var brúkaraprístalið roknað fyrstu ferð eftir nýggja vektargrundarlagnum, sum byggir á kanningar av nýtslumynstrinum hjá húsarhaldunum í 1998. Hesum verður greitt gjølliga frá í bóklinginum. Á Hagstovuni hevur John Jacobsen staðið fyri verkætlanini og hevur lagt bóklingin til rættis.

Bóklingurin fæst í bókabúðunum og kostar 50 kr.

# Meining um SVF

**Símin J. Højsted**

Eg dugi ikki at skilja, at gjaldið fyri SVF skal hækka so nógv, tað kann ikki kosta so nógv at senda endursendingar. Eg læs í einum blaði, at ein sunnudag vóru 13 endursendingar, og nú er tað um Vágatunnilin, sum skal sendast aftur og aftur, eg havi sjálvur koyrt strekkið, og má geva fólkinum stórt rós fyri eitt megnar arbeiði, sum er sera væl úr hondum greitt.

Tit kundu gjørt ein endursendingardag, so vita fólk at tað, ið ein hevur áhuga fyri, kann síggjast ein ávísan dag í vikuni, um ikki møguligt var at hyggja, tá hetta ávísa program varð sent.

Spurningurin um hvar/hvussu peningurin hjá SVF er nýttur, hetta hevði verið spennandi at fingið meir at vita um?

Eg skilji ikki at gjaldið bara verður góðtikið av fólki, er tað okkurt annað sum kemur, so er rokan í fjøruni, beinanvegin tankin bert verður luftaður. Tosað hevur verið nógv um stðuul til fiskivinnu o.a., hetta sigst ikki gera eina burðadygga vinnu. Menn í hesari vinnu siga, at tað gongur gott fyri uttan stuðul, vinnan lagar seg betur til viðurskiftini, og tað, sum ber seg livur, tað ið ikki klárar seg doyr.

Soleiðis kundi til dømis verið gjørt við SVF, so mugu teir taka seg saman og gera nakað, sum er vert at hyggja eftir, og soleiðis vinna sær pening.

Eg var inni í einum handli í dag, og spurdi um eina parabol, møguliga ein kassa frá televarpinum, har fekk eg at vita, keypur tú pakkan frá televarpinum, so er millum annað dagur og vika við í pakkanum, tí tú betalir jú til SVF, óanæð, so er tað prísmunurin millum televarpið og tína egnu parabol, parabolin ið tú keypur, er spard inn eftir 2 ár, og tú sleppur at síggja tað tú vilt, so er ikki frá televarpinum, har er sensurur á.

Sjónvarpið mátti roynt at betra um støðið, fingið sær fleiri filmar, dokumentarsendingar, so fólk vóru meira positivt innstillaði, kanska gjørt okkurt, ið minnir um keypsfilmar, hvar fólk kunnu velja hvat tey vilja hava. Eitt hugskot til dagur og vika er, at tit halda tykkum innanoyggja og so fara út í heim, sum nú er so eru vit tildømis fyrst stadd í Svínoy, so Simbabwe og so Kollafirði og so aftur í Kina.

Tey ið eru deyv, gjalda væl eisini fult gjald, men eru eftir tykkara meining, kanska nøkur, ið ikki skulu síggja dag og viku fyrr enn dagin eftir, tað er ikki rætt, tað má bera til at tey eisini síggja tíðindi saman við okkum hoyrandi.

Við vón um betringar, ið samsvara við hækking í gjaldi.

# Nei, nei Bjarni Djurholm, so lætt sleppur tú ikki

**Anton Petersen**

Tað bleiv samtykt yvir 2 løgtingsval, at ein samferðslu- og djúpvatnshavn skuldi gerast í Vági. At tú alla tíðina hevur arbeitt ímóti hesum projekti, hava vit sæð bæði í skrift og talu. Øll minnast, hvussu tú royndi at minka Smyril, meðan Hergeir og aðrir royndu at leingja hann. Fekk tú tín vilja ígjøgnum, fingu vit eitt skip, sum valla hevði kunnað brúkst til dagin í dag og so slett ikki til dagin í mgin. Hevði Hergeir ikki hildið so fast um upprunaprojektið, høvdu vit ikki fingið nakað sum helst. Nú sær tað út til at vit fáa eina djúpvatnshavn og hol verður sett á tunnilsgerðina millum Hov og Øravík, vónandi. Og er tað ikki tær at takka fyri, Bjarni Djurholm, men Hergeiri Nielsen.

Tað man vera ein beiskur biti, tá man hevur stíðst fyri eini sak, at aðrir stíga fram og taka sær æruna av henni. Men soleiðis skal tað ikki enda í hesum føri.